# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 14.10.2024 kl. 16:30
**Málnr.:** 21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
Varalimir:
Ikki møtt:
Onnur: Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 68/24 | 21/01969-7 | Dagføring av reglugerð fyri grundstykkjalistan |
| 69/24 | 21/01716-69 | Byggisamtykt fyri Svínoy |
| 70/24 | 21/01949-24 | Byggisamtyktarbroyting úti í Grøv fyri frama av eldradepli |
| 71/24 | 23/01194-12 | Byggisamtyktarbroyting fyri A18 og B9 |
| 72/24 | 23/01320-32 | Byggisamtyktarbroyting fyri sølutorg, almenn vesi o.a. E5 |
| 73/24 | 24/00901-2 | Umsókn um at býta neystapartin í matr.nr. 820a frá restina av jørðini í Uppsølum |
| 74/24 | 24/00720-3 | Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 18, 25 og 26 á Trøllanesi |
| 75/24 | 24/00924-1 | Sundurbýti av matr.nr. 43c |
| 76/24 | 24/00740-2 | Umsókn um marknaumskipan millum matr.nr. 5 og 6 á Húsum |
| 77/24 | 22/00768-14 | Flyting av sethúsunum á matr.nr. 1160, Klaksvík |
| 78/24 | 21/01334-94 | Neyðugar matrikulumskipanir við vegamótið Stangavegur/Garðavegur |
| 79/24 | 24/00825-3 | Skráseting av undirlendi við leigusáttmála - matr.nr. 95 og 96 á Syðradali (uppruna matr.nr. 51) |
| 80/24 | 24/00328-21 | Skipan av øki 14 í miðbýnum |
| 81/24 | 24/01013-4 | Innafturtøka av matr.nr. 746d - alment parkeringsøki? |
| 82/24 | 24/00578-3 | Nýggjar bátabrúgvar á Borðoyarvík - *flyting av játtan, seinna viðgerð* |
| **Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum** | | |
| 83/24 | 24/00292-16 | Umsókn um meirøki |

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Til viðgerðar**

## 68/24
## 21/01969-7 Dagføring av reglugerð fyri grundstykkjalistan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2024 | 75/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.09.2024 | 67/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 14.10.2024 | 68/24 |

**21/01969-7 Dagføring av reglugerð fyri grundstykkjalistan**

**Frágreiðing um málið:**
Fyri ikki at skapa óneyðugar tvístøður ísb. við handhevjan og tulking av reglugerð fyri grundstykkjalistan í mun til praksis, verður ein dagførd reglugerð løgd fyri nevnd og býráð.

- Tey fýra høvuðspunktini fyri reglugerðina eru betur lýst. Í nýggja uppskotinum er eingin ivi um, at talan er um alla fastogn, ið ein kann hava til fastan bústað.
- Áður stóð, at umsóknir verða sendar til avvarðandi nevnd, hetta verður ikki praktiserað, ístaðin verður ein kunning um støðuna og eftirspurning løgd fyri nevnd.

Í verandi reglugerð verður heimildin um frávík løgd út til UBN, men umsitingin ynskir, at nevndin viðger, um tað framvegis skal vera UBN, ella um býráðið skuldi átikið sær leiklutin. Tí tá talan er um frávík, so er talan oftast um sermerkt mál, ið krevja serstaka støðutakan.

Reglugerðin varð seinast dagførd í 2014.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Heimsmál nr. 11

**Lógargrundarlag:**
Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn
*§2, stk. 4. kommunala útstykkingar o.l., har tillutan og prísáseting fara fram eftir frammanundan ásettum reglum.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Eingin.

**Tilmæli:**
Nýggj reglugerð verður løgd fyri nevnd og býráð til støðutakan, og støðutakan til um heimildin at viðgera frávik skal liggja hjá UBN ella Býráðnum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2024:**
Nevndin tekur undir við uppskotinum til dagførda reglugerð, dagf. 26-08-2024, og mælir til, at depositum fyri at vera á grundstykkjalistanum verður 5.000 kr. (tvs. við afturvirkandi kraft.)
Nevndin mælir til, at møgulig frávik frá reglunum skulu viðgerast av býráðnum.

**Fíggjarnevndin 25. september 2024:**
Nevndin tekur undir við UBN 16-09-2024.

**Klaksvíkar Býráð 14. oktober 2024:**
Tilmælið frá FíN 25-09-2024 einmælt samtykt.

## 69/24
## 21/01716-69 Byggisamtykt fyri Svínoy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Svínoyarnevndin | 27.08.2024 | 17/24 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2024 | 80/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 14.10.2024 | 69/24 |

**21/01716-69 Byggisamtykt fyri Svínoy**

**Frágreiðing um málið:**
Uppskot til byggisamtykt fyri Svínoy hevur ligið frammi til alment eftirlit í Miðlan í Klaksvík frá 22.04.2024 – 13.05.2024. Somuleiðis varð lýst á heimasíðu kommununnar, portal.fo og í Norðlýsinum.

Kærufreistin var úti 03.06.2024, og inn komu 12 viðmerkingar/kærur. Kærurnar eru nærri lýstar og endurgivnar í fylgiskjølunum.

Umsitingin metir, at byggisamtyktin er nú so væl skipað og fyrireikað til at verða send landsstýris-fólkinum til góðkenningar.
Viðmerkjast skal, at onkrar viðmerkingar og broytingaruppskot eru innkomin, sum umsitingin metir kunnu viðgerast sum sjálvstøðug mál/byggisamtyktarbroytingar, eftir at byggisamtyktin er sett í gildi.

Byggisamtyktin hevur leingi verið ávegis, av tí sama liggja nógv mál (byggiloyvi og matrikulmál) í bíðistøðu, hesi kunnu ikki viðgerast, fyrr enn byggisamtyktin er góðkend.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Mál 11: Burðardyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
- Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.
- Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m.,

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
- Mælt verður nevndum og býráð til at heimila umsitingini at senda lýstu byggisamtykt fyri Svínoy hin 22.04.2024 til góðkenningar.
- Mál, sum mett verður hava týdning, kunnu møguliga verða tikin upp til eina seinnu viðgerð og broyting – um kærarin ynskir hetta.

**Svínoyarnevndin 27. august 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmæli frá fyrisitingini dagf. 20-08-2024.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 20-08-2024.

**Klaksvíkar Býráð 14. oktober 2024:**
Tilmælið frá UBN 16-09-2024 einmælt samtykt.

## 70/24
## 21/01949-24 Byggisamtyktarbroyting úti í Grøv fyri frama av eldradepli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2024 | 77/24 |
| 2 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 17.09.2024 | 44/24 |
| 3 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 17.09.2024 | 26/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 14.10.2024 | 70/24 |

**21/01949-24 Byggisamtyktarbroyting úti í Grøv fyri frama av eldradepli**

**Frágreiðing um málið:**
Í samband við ætlanina um at skapa karmar til ein komandi eldradepil úti í Grøv við tilhoyrandi virksemi, fleiri bústaðarmøguleikar og økir til frítíðarvirksemi, var almenn hoyring av byggisamtyktini í døgunum 14. juni – 5. juli 2024, seinasta freist at kæra og viðmerkja uppskotið var 26. juli 2024.
Inn komu tvær viðmerkingar/kærur. Kærurnar eru nærri lýstar og endurgivnar í fylgiskjølunum.




*D42, A33, A34, C22*

**Burðardygd og heimsmálini:**
Mál 11: Burðardyggir býir og

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.

Løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð v.m.

> **§ 9.** *Búnaðarstovuni verður heimilað burtur av landsjørð at selja jørð til almenn endamál, grundstykkir til húsabygging, handils- og ídnaðar-, havbúnaðar-, ítróttar- og frítíðarendamál o.a. Áðrenn jørð verður seld burtur av einum festigarði ella leigutrøð, skal festarin/leigarin verða eftirspurdur. Keypspeningurin verður fluttur á festikontu*

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Lýsing av byggisamtyktini.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at økisparturin D7.1 verður til D42. Mælt verður til at halda fast í lýsta økismarki, men at økið verður lýst sum fríøki, eins og tað er lýst í økisblaðnum.
Annars verður mælt til at halda fast við ætlanina um nýggju økispartarnar A33, A34, C22.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-09-2024, og mælir til, at sama mannagongd, sum áður hevur verðið nýtt til aðrar festarar og tilstundandi festarar at seta búgv á festijørð, framhaldandi verður fylgd. Umsitingin tekur upp samskifti við Búnaðarstovuna.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 17. september 2024:**
Nevndin tekur undir við UBN 16.09.24.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 17. september 2024:**
Nevndin tekur undir við TrN B&U 17.09.24.

**Klaksvíkar Býráð 14. oktober 2024:**
Tilmælið frá E&B 17-09-2024 einmælt samtykt.

## 71/24
## 23/01194-12 Byggisamtyktarbroyting fyri A18 og B9

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2024 | 78/24 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 18.09.2024 | 36/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 14.10.2024 | 71/24 |

**23/01194-12 Byggisamtyktarbroyting fyri A18 og B9**

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til ætlanina at víðka A18 (blandað íbúðar- og vinnuendamál) til at umfata matr.nr. 1009b og partar av matr.nr. 1009a og t, og ikki longur sum partar av B9 (vinnuøki).
Almenn hoyring varð av byggisamtyktini í døgunum 12. feb. – 4. mars 2024, seinasta freist at kæra og viðmerkja uppskotið var 25. mars 2024.
Inn komu tvær viðmerkingar/kærur frá sama borgara. Viðmerkingarnar/kærurnar eru nærri lýstar og endurgivnar í fylgiskjølunum.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Mál 11: Burðardyggir býir og býlingar
Kommunustýrislógin §10

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at síggja burt frá kæruni.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2024:**
*Oddmar á Lakjuni luttók ikki i viðgerðini av málinum vegna ógegni.*
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-09-2024.

**Havna- og Vinnunevndin 18. september 2024:**
*Oddmar á Lakjuni luttók ikki i viðgerðini av málinum vegna ógegni.*
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 16-09-2024

**Klaksvíkar Býráð 14. oktober 2024:**
*Oddmar á Lakjuni luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*
Tilmælið frá HaVN 18-09-2024 einmælt samtykt.

## 72/24
## 23/01320-32 Byggisamtyktarbroyting fyri sølutorg, almenn vesi o.a. E5

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2024 | 79/24 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 18.09.2024 | 37/24 |
| 3 Tekniska Nevnd | 18.09.2024 | 50/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 14.10.2024 | 72/24 |

**23/01320-32 Byggisamtyktarbroyting fyri sølutorg, almenn vesi o.a. E5**

**Frágreiðing um málið:**
Í samband við stovnanina av nýggja økispartinum E5, ið er ætlaður til miðstaðar- og bústaðarøkispart, var almenn hoyring av byggisamtyktini í døgunum 1. mai – 22. mai 2024; seinasta freist at kæra og viðmerkja uppskotið av nýggja økispartinum var 12. juni 2024.
Í hesum sambandi komu inn tvær viðmerkingar/kærur. Viðmerkingarnar/kærurnar eru nærri lýstar og endurgivnar í fylgiskjølunum.



*E5*

**Burðardygd og heimsmálini:**
Mál 11: Burðardyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
- Mælt verður til at taka viðmerkingina frá Klaksvíkar kappróðrarfelag um bátabrúgvarnar og Føgruvík til eftirtektar.
- Áheitan frá R.B. um býartætting og liðugtgerð av verandi býrúmum/verkætlanum verður tikin til eftirtektar.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-09-2024.

**Havna- og Vinnunevndin 18. september 2024:**
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 16-09-2024

**Tekniska Nevnd 18. september 2024:**
Nevndin tekur undir við HaVN 18-09-2024.

**Klaksvíkar Býráð 14. oktober 2024:**
Atkvøtt varð um byggisamtyktarbroytingina (tvs. skipa eitt nýtt øki E5) og at taka innkomnu viðmerkingarnar til eftirtektar; tað varð samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, JS, TJL og ÓML), 1 atkvøðu ímóti (ASB) og 1 blankari atkvøðu (SVJ).

KLAKSVÍKAR KOMMUNA
Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

## 73/24
## 24/00901-2 Umsókn um at býta neystapartin í matr.nr. 820a frá restina av jørðini í Uppsølum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2024 | 89/24 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 18.09.2024 | K-13/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 14.10.2024 | 73/24 |

**24/00901-2 Umsókn um at býta neystapartin í matr.nr. 820a frá restina av jørðini í Uppsølum**

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður í e-posti tann 25. juli 2024 um kommununnar ummæli til sundurbýti av matr.nr. 820a í Klaksvík.

Matr.nr. 820a er í 4 lutum, staðsettir:

- á Deildini: 745 $m^2$
- á Fløtum: 3415 $m^2$
- Uppi á Fossum: 3426 $m^2$ og
- Neyst við Borðoyarvík: 287 $m^2$

Í umsókn um sundurbýti dagf. 21-06-2024 verður biðið um at loysa partin við ábygdum neystum frá restini av ognini.

Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:
Byggisamtyktarliga liggur neystaparturin í økisparti D1 – Fríøki. Støða til neystabygging verður tikin í hvørjum einstøkum føri, har eisini friðingarmyndugleikanir verða eftirspurdir.
(Á lendinum eru bygd neyst - Yvirfriðingarnevndin góðkendi neystabygging 13. juli 2021).




**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi verður mælt til at viðmæla sundurbýti.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 23-08-2024.

**Havna- og Vinnunevndin 18. september 2024:**
Tilmælið, 23-08-2024, verið til kunningar

**Klaksvíkar Býráð 14. oktober 2024:**
Tilmælið frá UBN 16-09-2024 einmælt samtykt.

## 74/24
## 24/00720-3 Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 18, 25 og 26 á Trøllanesi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trøllanesnevndin | 28.08.2024 | 10/24 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2024 | 86/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 14.10.2024 | 74/24 |

**24/00720-3 Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 18, 25 og 26 á Trøllanesi**

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til sundurbýti av omanfyri nevndu matriklum á Trøllanesi.

Tekniska Umsiting hevur hesa lýsing av málinum:

*Matr.nr. 25 (lutur a):* Heimara Viðurbyrgi – vídd 319 $m^2$ við ábygdum hjalli (blátt á kortinum)
Staðseting í byggisamtyktini: C18 – Almenn endamál.
*Matr.nr. 2 (lutur b):* Yvir á Bø – vídd 1699 $m^2$ (violett á kortinum)
Staðseting í Almennu Byggisamtyktini: A 28 – Blandað íbúðar- og vinnuendamál
*Matr.nr. 25 (lutur c):* Uppi á Bø – vídd 1369 $m^2$ + 2. gl. uttangarðs (reytt á kortinum)
Staðseting í byggisamtyktini: G – landbúnaðarøki ( uml. 140 $m^2$ A28)
*Matr.nr. 18:* Uppi á Bø – vídd 445 $m^2$ + 2. gl. uttangarðs frá matr.nr. 26 (orange á kortinum)
Byggisamtyktarlig staðseting: G – landbúnaðarøki
*Matr.nr. 26:* Yvir á Bø – vídd 445 $m^2$ (ljósagrønt á kortinum)
Byggisamtyktarlig áseting: A 28 – Blandað íbúðar- og vinnuendamál

Søkt verður um sundurbýti í samband við býti av arvi, og ber umsóknin í høvuðsheitum í sær, at uttangarðsjørðin (2 gl.) í matr.nr. 26 verður flutt til matr.nr. 18, samstundis sum matr.nr. 25 verður býtt í 3 sjálvstøðugar partar, harav tær 2 gl. uttangarðs koma at hoyra til partin uppi á Bø.

Tekniska Umsiting ger vart við, at á niðasta parti av matr.nr. 25 (partinum uppi á Bø) stendur ein trafostøð á lendi, sum Mikladals Kommuna í ár 2000 gjørdi avtalu við táverandi eigaran um. – Hendan

avtalan er tíverri ongantíð formaliserað, og eiga arvingarnir eftir hann tískil á pappírinum framvegis lendið undir trafostøðini .



Lutir at býta sundur


Galdandi byggisamtykt

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

**Tilmæli:**
Tekniska Umsiting hevur ongar viðmerkingar til umsøkta sundurbýti, - tó verður mælt til, at arbeitt verður við at fáa greiðu á ognarviðurskiftunum uppá lendið undir trafostøðini.

**Trøllanesnevndin 28. august 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmæli frá fyrisitingini dagf. 19-08-2024.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2024:**
Nevndin tekur undir við Trøllanesnevndini 28-08-2024.

**Klaksvíkar Býráð 14. oktober 2024:**
Tilmælið frá UBN 16-09-2024 einmælt samtykt.

## 75/24
## 24/00924-1 Sundurbýti av matr.nr. 43c

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Húsanevndin | 28.08.2024 | 9/24 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2024 | 90/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 14.10.2024 | 75/24 |

**24/00924-1 Sundurbýti av matr.nr. matr.nr. 43c**

**Frágreiðing um málið:**
Tann 23. november 2023 samtykti Klaksvíkar Býráð at keypa matr.nr. 43a á Húsum, og 19. desember var ognin tinglisin til kommununa.
Sambært somu býráðssamtykt skal spurningurin, um ella hvussu stykkið skal býtast sundur, verða tikin upp á seinni fundi, har eisini Húsanevndin verður partur av viðgerðini.

> Fakta um matr.nr. 43c:
> Vídd: 1047 $m^2$
> Longd framvið vegi: uml. 41,5 m
> Byggisamtyktarlig støða:
> Økispartur B (sethúsaøki) í byggisamtykt frá 1988 fyri Húsa Kommunu.
> Minsta mark grundøkjavídd: 300 $m^2$ fyri stakhús, ella - eftir serligari fyriskipan - 260 $m^2$ fyri hvønn partin av tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum.

Allar bygdirnar í Klaksvíkar Kommunu, uttan Húsar og Syðradalur, eru partur av Almennu Byggisamtyktini fyri Klaksvíkar kommunu. - Hesar bygdirnar verða framvegis viðgjørdar eftir byggisamtyktini frá tíðini áðrenn samanlegging við Klaksvíkar Kommunu.
Upplýsast kann, at í næstum er ætlanin at fara undir at innbyggja Húsar og Syðradal í Almennu Byggisamtyktina fyri alla kommununa.

Við at sundurbýta matr.nr. 43c í 3 sethúsahúsagrundøkir, samsvarandi byggisamtyktina fyri Húsa Bygd, verður hvørt grundøki uml. 350 $m^2$. Longd framvið vegnum uppá uml. 13,80 m. (Vanlig longd framvið vegi er 19-21 metrar)




Dømi um sundurbýti av matr.nr. 43c í 3 eins stór grundøkir – longd framvið vegi uml. 13,80 m

**Burðardygd og heimsmálini:**
Nr. 11: Burðadyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. des. 1962 við seinni broytingum um matrikulering og sundurbýti v.m. broytingum

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Matrikulútreiðslur: uml. kr. 20.000,- um stykkjað verður út til 3 sethúsagrundøkir

**Tilmæli:**
Málið verður í fyrstu atløgu lagt fyri avvarðandi nevndir býráðsins til umrøðu og støðutakan til um

1. miðast skal eftir 3 sjálvstøðugum sethúsaøkjum sambært verandi byggisamtykt fyri Húsar, ella
2. at bíðað verður við støðutakan til sundurbýti, til byggisamtyktin á Húsum er vorðin partur í Almennu Byggisamtyktini fyri Klaksvíkar Kommunu. Í tí førinum verður matr.nr. 43c mest sannlíkt partur av A-økjunum (blandað bygging), har møguleiki er fyri bygging av sethúsum, raðhúsum og íbúðarbygging við minsta mark grundøki pr. sjálvstøðuga búeind verður millum 300 og 150 m$^2$.

**Húsanevndin 28. august 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá fyrisitingini dagf. 16-08-2024, pkt. 1. Nevndin mælir til, at kommunan setir seg í samband við grundstykkjaumsøkjara um longdina fram við vegnum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2024:**
Nevndin tekur undir við Húsanevndini 28-08-2024.

**Klaksvíkar Býráð 14. oktober 2024:**
Tilmælið frá UBN 16-09-2024 einmælt samtykt.

# 76/24
# 24/00740-2 Umsókn um marknaumskipan millum matr.nr. 5 og 6 á Húsum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Húsanevndin | 28.08.2024 | 8/24 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2024 | 87/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 14.10.2024 | 76/24 |

**24/00740-2 Umsókn um marknaumskipan millum matr.nr. 5 og 6 á Húsum**

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til marknaumskipan á Húsum, har matr.nr. 5 letur innangarðslutin við Gilið (2441 $m^2$) og uttangarðsjørðina í Líðini og Leitinum (11 gl.) til matr.nr. 6, sum frammanundan eigur 1 gl. 4 sk. í hagapartinum.
Umskipanin ber í sær, at eftirverandi partur av matr.nr. 5 á Húsum umfatar húsalutin Norðurgarður 2.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. des. 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m., seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

**Tilmæli:**
Tekniska Umsiting mælir til at viðmæla umsóknini

**Húsanevndin 28. august 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá fyrisitingini dagf. 16-08-2024.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2024:**
Nevndin tekur undir við Húsanevndini 28-08-2024.

**Klaksvíkar Býráð 14. oktober 2024:**
Tilmælið frá UBN 16-09-2024 einmælt samtykt.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

## 77/24
## 22/00768-14 Flyting av sethúsunum á matr.nr. 1160, Klaksvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 16.09.2024 | K-4/24 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2024 | 92/24 |
| 3 Tekniska Nevnd | 18.09.2024 | 44/24 |
| 4 Fíggjarnevndin | 25.09.2024 | 78/24 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 14.10.2024 | 77/24 |

**22/00768-14 Flyting av sethúsunum á matr.nr. 1160, Klaksvík**

**Frágreiðing um málið:**
Í samband við dagføring av Stangavegnum keypti Klaksvíkar kommuna ognina á Stangavegnum 34 við einari ætlan um at taka sethúsini niður. Eftir at kommunan yvirtók ognina, er ein marknaumskipan gjørd saman við eigaranum av matr.nr. 1158. Samlaða málið viðførir, at kommunan fær eina góða ferðsluloysn, tá Garðavegurin og Stangavegurin verða bundnir saman av nýggjum.

Síðani keypið av sethúsunum í 2022 hava ymiskir tankar verið frammi um framtíðina hjá húsunum. Tað seinasta uppskotið er at flyta sethúsini til eitt grundstykki longur norðuri, til Stangaveg nr. 29.

Ætlanin er at taka flytingina av sethúsunum við í málið um dagføring av Stangavegum, sum merkir, at málið verður við í útbjóðingini av arbeiðinum, sum fevnir um nýggju íbindingina og Garðabrekkuna.

Møguliga flytingin av sethúsunum er viðgjørd av myndugleikum kommununnar, og niðurstøðan er: ein marknaumskipan av lendi, sum kommunan eigur, og at nýggi kjallarin undir sethúsunum skal lúka krøvini í BK17. Býarskipanarliga er talan um eitt áhugavert mál m.a. av teirri orsøk, at fleiri líknandi hús eru í økinum frammanundan.

Ætlanin er at selja sethúsini við einum óinnrættaðum kjallara, har kommunan veitir neyðugar leiðingar til og frá sethúsunum. Ætlanin umfatar eisini at planera frammanfyri sethúsið, soleiðis at minst 2 bilar kunnu standa á ognini.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Vísandi til tey 17 heimsmálini, sum Føroya Landsstýri og Klaksvíkar Býráð taka undir við, kann vísast til m.o. mál nr.11, sum umfatar, at gera býir og búsetingar inkluderandi, trygg, dygg og burðardygg.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Mett verður, at málið fer ikki at kosta kommununi pening. Ætlanin er, at málið í minsta lagi skal javnviga, sum merkir, at inntøkan frá sølu skal verða størri enn útreiðslurnar. Ætlanin er víðari, at møguligur avlopspeningur skal brúkast til Stangavegin.

**Tilmæli:**
Tekniska Fyrisiting fer við hesum at mæla viðkomandi nevndum og býráði til at taka undir við ætlanini.

**Ferðslunevndin 16. september 2024:**
Tilmælið, dagf. 07-09-2024, verið til kunningar.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-09-2024.

**Tekniska Nevnd 18. september 2024:**
Nevndin tekur undir við UBN 16-09-2024.

**Fíggjarnevndin 25. september 2024:**
Nevndin tekur undir við TN 18-09-2024.

**Klaksvíkar Býráð 14. oktober 2024:**
*Óli M. Lassen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*
Tilmælið frá FíN 25-09-2024 samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, JS, SVJ og TJL), 1 atkvøðu ímóti (ASB).

## 78/24
## 21/01334-94 Neyðugar matrikulumskipanir við vegamótið Stangavegur/Garðavegur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2024 | 85/24 |
| 2 Tekniska Nevnd | 18.09.2024 | 47/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 25.09.2024 | 75/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 14.10.2024 | 78/24 |

**21/01334-94 Neyðugar matrikulumskipanir við vegamótið Stangavegur/Garðavegur**

**Frágreiðing um málið:**
Í samband við fremjan av vegarbeiðinum á strekkinum Stangavegur/Garðavegur er neyðugt við avtalum við eigarar í økinum um lendi til vegin.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Nr. 11- Burðardyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Verður fíggjað av verkætlanini.

**Tilmæli:**
Biðið verður um heimild til at samráðast við avvarðandi partar útfrá peningaligum endurgjaldi ella makaskifti við annað lendi í økinum, fyri síðani at søkja Umhvørvisstovuna um marknaumskipan út frá gjørdum avtalum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-09-2024.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Tekniska Nevnd 18. september 2024:**
Nevndin tekur undir við UBN 16-09-2024.

**Fíggjarnevndin 25. september 2024:**
Nevndin tekur undir við TN 18-09-2024.

**Klaksvíkar Býráð 14. oktober 2024:**
*Óli M. Lassen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*
Tilmælið frá FíN 25-09-2024 samtykt við 8 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, JS og TJL), og 2 atkvøðum ímóti (ASB og SVJ).

## 79/24
## 24/00825-3 Skráseting av undirlendi við leigusáttmála - matr.nr. 95 og 96 á Syðradali (uppruna matr.nr. 51)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Syðradalsnevndin | 28.08.2024 | 7/24 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2024 | 88/24 |
| 3 Havna- og Vinnunevndin | 18.09.2024 | 39/24 |
| 4 Fíggjarnevndin | 25.09.2024 | 77/24 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 14.10.2024 | 79/24 |

**24/00825-3 Skráseting av undirlendi við leigusáttmála - matr.nr. 95 og 96 á Syðradali (uppruna matr.nr. 51)**

**Frágreiðing um málið:**
Borgari hevur víst á, at hann í 2005 keypti matr.nr. 51, sum tá lá í 5 lutum: sethús, dupultur hjallur, úthús og 2 neyst.
Eftirfylgjandi er hann vorðin varugur við, at lendið undir neystunum ikki longur er skrásett sum matr.nr. 51 (hansara ogn), men eru broytt til matr.nr. 95 og 96 (ogn hjá Húsa Kommunu).
Sambært upplýsingum frá Umhvørvisstovuni er broytingin farin fram í samband við innangarðsútskifting, og var avtalan tá, at leigusáttmáli skuldi gerast við neystaeigararnar. – Hetta er tíverri ongantíð blivið gjørt.

*Upplýsast kann tó, at Tekniska Umsiting nýliga hevur sent onkrum av neystaeigarunum í sunnara (myrkabláa) parti av økinum leigusáttmála til undirskrivingar – hetta við heimild í samtykt frá Syðradalsnevndini, Umhvørvis- og býarskipanarnevndini og Havna – og Vinnunevndini í nov/des 2022*



**<u>Burðardygd og heimsmálini:</u>**
Nr. 11 Burðardyggir býir og býlingar

**<u>Lógargrundarlag:</u>**
Matrikullógin
Kommunufulltrúin

**<u>Fíggjarligar avleiðingar:</u>**
-

**<u>Tilmæli:</u>**
Vísandi til omanfyristandandi frágreiðing saman við upplýsingum frá Umhvørvisstovuni um úskiftingina, mælir Tekniska Umsiting til, at langtíðar-leigusáttmáli verður gjørdur við borgaran og allar aðrar neystaeigarar, sum kunnu skjalfesta ognarrættin til neystið og hvørja neystabygningar standa á frámatrikuleraðum øki.

(Frámatrikuleraðu økini við ábygdum neystum eru víst á viðhefta skjali I)

**<u>Syðradalsnevndin 28. august 2024:</u>**
Nevndin tekur undir við tilmæli frá fyrisitingini dagf. 19-08-2024.

**<u>Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2024:</u>**
Nevndin tekur undir við Syðradalsnevndini 28-08-2024.

**<u>Havna- og Vinnunevndin 18. september 2024:</u>**
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 16-09-2024

**<u>Fíggjarnevndin 25. september 2024:</u>**
Nevndin tekur undir við HaVN 18-09-2024.

**<u>Klaksvíkar Býráð 14. oktober 2024:</u>**
Tilmælið frá FíN 25-09-2024 einmælt samtykt.

# 80/24
# 24/00328-21 Skipan av øki 14 í miðbýnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2024 | 76/24 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 18.09.2024 | 35/24 |
| 3 Tekniska Nevnd | 18.09.2024 | 49/24 |
| 4 Fíggjarnevndin | 25.09.2024 | 68/24 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 14.10.2024 | 80/24 |

## 24/00328-21 Skipan av øki 14 í miðbýnum

**Frágreiðing um málið:**
Samskifti hevur verið millum kommununa og Føroya Bjór um leiguøki til Føroya Bjór í miðbýnum. Avrátt varð, at umsitingin arbeiðir víðari við skitstu og fer at skipa økið í mun til fermetrabýti, veg, parkering o.a.

Samstundis verður arbeitt við einum almennum parkeringsplássi í økinum ísv. bryggjuarbeiði og hotellverkætlan, har hotellverkætlanin hevur boðið seg til at arbeiða við lendismuninum og rigga økið til til almenna parkering.

Umsitingin metir ikki uppskotið frá hotellverkætlanini verða skynsamt móti avtaluni við Føroya Bjór, tí teir bundnu 600 fermetrarnir eru sera illa skipaðir, tá endamálið við økinum er (bingju)goymsla.

Umsitingin ger eina roynd við at samantvinna avtaluna við Føroya Bjór og ynskið um almenn parkeringspláss frá hotellinum.




*Prinsipploysn*

Nevnast skal, at við hesi loysn, so verður gingið burtur frá treytini um einans at leiga økið, ið er sambært byggiøki 14 í serstøku byggisamtyktini fyri miðbýin. Umsitingin metir, at henda loysn er so mikið gagnlig fyri allar partar, at tað er skynsamt at slaka frá hesi treyt.

Samantvinnaða prinsipployssnin inniber, at:

- Føroya Bjór fær eitt stórt leiguøki á 600 m$^2$ til goymslu (sambært býráðssamtykt des. 2017)
- Føroya Bjór fær eitt meirøki á uml. 160 m$^2$ til t.d. starvsfólkaparkering. Tað er minni enn tað, tey ynskja, men mett verður, tað er betur enn einki.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

- Klaksvíkar kommuna fær skipað uml. 30 eyka almenn parkeringspláss í miðbýnum.
    - Hotellið átekur sær byggibúningina.
        - Kann nýtast sum goymsla, meðan hotellið verður bygt
    - Hotellið kann vísa til eitt alment parkeringspláss í nærumráðinum. Parkeringsplássini verða ikki oyramerkt til hotellið.
- Betonggarðurin (limegrønt á myndini omanfyri) verður ein týðiligur skilnaður millum eitt alment býrúm og vinnuøkið.
- Jarðarmunurin millum bryggjuna og verandi lendi (Føroya Bjór) verður loystur.

Um henda prinsipploysn verður samtykt, fer kommunan (stýrisbólkurin) saman við hotellinum at ráðføra seg við ráðgevar um endaligu loysnina av almennu parkeringsplássunum og vegnum.
Føroya Bjór verður eisini hoyrt í hesi tilgongd. Føroya Bjór kemur sjálvt at gera møgulig tiltøk inni á teirra frámerkta leiguøki.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Mál 11: Burðardyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin
Serstaka byggisamtyktin fyri miðbýin

Annars verða somu treytir settar Føroya Bjór í mun til leigusáttmála sum í samtykt Býráðsins 24.04.24.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-Útreiðslur ísb. við uppmáting av økinum uml. kr. 10.000,- (*Byggibúning, miðbýur*).
-Kommunan ber ongan meirkostnað av at byggibúgva økið, hotellið átekur sær arbeiðið. Møguliga ber kommunan ein part av garðinum (uml. 50 tkr.), tí hann ikki er ein partur arbeiðstøkuni fyri bryggjuna/kanalina (*Byggibúning, miðbýur*).

**Tilmæli:**
Umsitingin mælir nevnd og býráð at samtykkja lýstu prinsipploysn fyri økið í miðbýnum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2024:**
*Jógvan Skorheim luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-09-2024.

**Havna- og Vinnunevndin 18. september 2024:**
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 16-09-2024

**Tekniska Nevnd 18. september 2024:**
Nevndin tekur undir við HaVN 18-09-2024.

**Fíggjarnevndin 25. september 2024:**
*Jógvan Skorheim luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*
Nevndin tekur undir við TN 18-09-2024.

**Klaksvíkar Býráð 14. oktober 2024:**
Málið tikið av skrá.

## 81/24
## 24/01013-4 Innafturtøka av matr.nr. 746d - alment parkeringsøki?

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 16.09.2024 | 34/24 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2024 | 91/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 25.09.2024 | 81/24 |
| 4 Tekniska Nevnd | 18.09.2024 | 43/24 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 14.10.2024 | 81/24 |

**24/01013-4 Innafturtøka av matr.nr. 746d - alment parkeringsøki?**

**Frágreiðing um málið:**
Samskifti um innafturtøku ella keyp av matr.nr. 746d hevur verið til umrøðu í fyrisitingini seinastu tíðina.

Staðfest er, at eigarin av stykkinum er áhugaður í at lata stykkið innaftur, og verður víst til viðheftu reglugerð kommununnar um sølu av útgrivnum kommunalum grundstykkjum í hesum sambandi.

Eigarin hevur gjørt stykkið byggibúgvið.

Tekniska fyrisiting hevur umrøtt málið, um stykkið skal takast innaftur t.d. at nýta til eitt parkeringspláss. Viðmerkt er t.d., at tað verður trupult at fáa eina styttri gøtu niðan til vegin Niðan Horn, og tí er ivasamt, um íbúgvar í økinum fara at gera nýtslu av parkeringsplássinum.

Her skal verða skoytt uppí, at stórt byggiøki er niðanfyri vegin undir Fossum, sum við tíðini møguliga eisini kann fáa gagn av einum almennum parkeringsplássi, og at bilar standa ofta parkeraðir á vegnum, eftir vegateininum, nakað frá rundkoyringini og suðureftir.

Kommunan eigur grannastykkið norðanfyri, og tí ber til at gera eitt parkeringspláss, har bilar venda rætt, tá koyrt verður út á vegin.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Vísandi til tey 17 burðardyggu menningarmálini hjá ST, sum Føroya Landsstýri og Klaksvíkar kommuna hava tikið undir við, verður víst til m.o. mál nr. 11, sum umfatar at gera gera býir og búsetingar inkluderandi, trygg, dygg og burðardygg.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Møguligt keyp kann fíggjast av tekniskum íløgukontum.

**Tilmæli:**
Við hesum verður málið lagt fyri nevndir og býráð til umrøðu/støðutakan.
Um tikið verður undir við málinum, mælir fyrisitingin til, at viðfesta reglugerð um innafturtøku av grundstykkjum, samtykt á býráðsfundi 29. sep. 2022, verður fylgd.

**Ferðslunevndin 16. september 2024:**
Nevndin staðfestir, at parkeringsøkir mangla í økinum, og tekur tí undir við, at kommunan ognar sær økið til parkeringspláss.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2024:**
Ein meiriluti, GvK, OáL, EÓP og JS, tekur undir við at taka stykkið innaftur at nýta til alment parkeringspláss og halda seg til reglugerð kommununnar um innafturtøku av grundstykkjum.
Ein minniluti, SVJ, mælir til at taka stykkið innaftur og síðani seta stykkið á almenna sølulista kommununnar.

**Tekniska Nevnd 18. september 2024:**
Ein meiriluti, OáL, EÓP og ASJ, tekur undir við meirilutanum í UBN 16-09-2024.
Ein minniluti, SVJ, tekur undir við minnilutanum í UBN 16-09-2024.

**Fíggjarnevndin 25. september 2024:**
Ein meiriluti, KHJ, ASJ, OáL og JS, tekur undir við meirilutanum í TN 18-09-2024. Ein minniluti, SVJ, tekur undir við minnilutanum í TN 18-09-2024.

**Klaksvíkar Býráð 14. oktober 2024:**
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá FíN 25-09-2024; tað varð samtykt við 7 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, EÓP, JS og ÓML) og 2 atkvøðum ímóti (ASB og SVJ). JCC og TJL atkvøddu ikki.

## 82/24
## 24/00578-3 Nýggjar bátabrúgvar á Borðoyarvík - *flyting av játtan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Havna- og Vinnunevndin | 18.09.2024 | 30/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.09.2024 | 80/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2024 | 67/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 14.10.2024 | 82/24 |

**24/00578-3 Nýggjar bátabrúgvar á Borðoyavík - flyting av játtan, seinna viðgerð**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 26. september 2024.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
1,5 mió kr av óbrúktari játtan verður flutt frá verkætlanini *Norðhavnin* til verkætlanina *bátahylur á Borðoyarvík*, báðar liggja undir Kl. Havn.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at nevndin tekur undir við at flyta 1,5 mió kr av óbrúktari játtan frá *Norðhavnini* til verkætlanina *bátahylur á Borðoyarvík*.

**Havna- og Vinnunevndin 18. september 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-09-2024

**Fíggjarnevndin 25. september 2024:**
Nevndin tekur undir við HaVN 18-09-2024.

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2024:**
Tilmælið frá FíN 25-09-2024 einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 14. oktober 2024:**
Tilmælið frá BýR 26-09-2024 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

**FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**

## 83/24
## 24/00292-16 Umsókn um meirøki

Fundurin lokin kl. 19:45